


LØGTINGSVALIÐ 19. JANUAR 2008

# Tann triði vegurin – og tann gongda leiðin



HELENA DAM
Á NEYSTABØ
Javnaðaflokkurin

Eg havi í valstríðnum ført fram, at størsta forðingin fyri framburði á sjálvstýrisleið er fatanin, at tað eru bert tveir møguleikar - annaðhvørt samband ella fullveldi.

Sambandflokkurin og Tjóðveldisflokkurin, sum í hesum døgum eru á sjarmuferð saman kring landið, hava megnað at frýst hesa støðu so fasta í føroyskum politikki, at oyðimarkargongdin helst fer at halda fram í eini 100 ár afturat.

Farna valskeið hevur prógvað, at tað finst ein triði vegur. Tann hóvligi vegurin, har yvirtøkur verða framdar í góðum samsvari við búskapin og við fólkið, og har sjálvsavgerðarrættur Føroya verður virdur, vardur og styrktur. Við yvirtøkulógini hava vit fingið neyðuga amboðið.

Javnaðarflokkurin hevur prógvað, at tað ber til at ganga hesa leið – og at koma á mál.

Eydnast tann triðja kósin – so hava Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin helst útspælt sín leiklut í føroyskum politikki, og tí eru teir farnir í valstríð saman, fyri at fyribyrgja, at tað hendir.

Eg vóni, at veljarin gevur hesum veruleika gætur, tá ið krossurin skal setast leygardagin.

Øll stig á sjálvstýrisleið eru tikin av javnaðarflokkinum. Og so verður eisini í framtíðini.

Eitt samfelag, sum strembar eftir at verða sjálvbjargið, er eitt sterkt samfelag.

# Fastlønarskipan í fiskiídnaðinum



HELENA DAM Á
NEYSTABØ
Javnaðaflokkurin

Nú veit eg væl, at man skal vara seg fyri at hava hugsanir um mál, sum partarnir á arbeiðsmarknaðinum skulu loysa í sínámillum samráðingum. Í einum samansettum og kompleksum samfelag, eru viðurskiftini ofta tengd saman kortini.

Eg haldi, at tann politiska skipanin kann loyva sær at boða frá, at hon heldur tað vera eitt gott hugskot, um partarnir á arbeiðsmarknaðinum fara undir at samráðast um eina fastlønarskipan í fiskiídnaðinum.

Skal tað eydnast, er óivað neyðugt at førleikamenna arbeiðsmegina, og í tí sambandinum er tað, at tað almenna kann og skal geva sítt íkast, og skipa fyri neyðugari førleikamenning, so at vit fáa loyst hetta fyri tann føroyska arbeiðsmarknaðin so týðandi mál.

Hóast vánaligt hagtalsgrundarlag í Føroyum, so hevur Samtak boðað frá, at ein meðalinntøka hjá flakakvinnu í Føroyum í dag er 8.000 kr um mánaðin. Er hetta einasta inntøkan hjá húskinum, so liggur hon langt undir hungursmarkinum – sum vit bara ikki hava ásett.

Tað liggja stórar uppgávur fyri framman hjá einum samhaldsføstum Javnaðarflokki at bøta um hesi kor, og at minka um stættargjónna. Hesar kvinnur eru ein av grundstuðlunum í høvuðsvinnu okkara. Og henda stættin hevur meira enn nøkur onnur stætt uppborið trygg livikor.

Eg havi í valstríðnum greitt frá, at spurningarnir um ein ov heitan búskap og um útlendska arbeiðsmegi hanga saman, og mugu loysast við atliti hvørt at øðrum. Er búskapurin ov heitur, má man annaðhvørt minka um ferðina við at tálma almennum íløgum, ella innflyta útlendska arbeiðsmegi. Tað ber ikki til at gera hvørki!

Semjast partarnir um eina fastlønarskipan, verður tað munandi lættari at fáa í lag avtalur um at loyva útlendska arbeiðsmegi til Føroyar.

# Heilsuverkið og Skúlaverkið skal raðfestast



HELENA DAM
Á NEYSTABØ
Javnaðaflokkurin

Heilsuverkið er ómissandi karmur um vælferðarsamfelagið, og tað er umráðandi at gera íløgur í heilsuverk, at veita viðgerðartrygd og ikki minst at menna heilsustarvsfólkið.

Nýta vit møguleikarnar at gera heilsuverkið til eitt gróðrarríkt granskingarøki, so vendist kósin frá taparakós til vinnarakós.

Fólkaskúlin er vælferðarvøggan og grundstøðið undir øllum samfelagsskipanum. Umframt ein miðvísan eftirútbúgvingarpolitikk skal læraraútbúgvingin upp á masterstig. Og granskingin, hon skal í gongd nú.

### Íløga í starvsfólkið

Virðismiklasta tilfeingið í øllum samfelagsskipanum er starvsfólkið. Í alt ov mong ár hevur týdningurin av starvsfólkamenning og starvsfólkarøkt verið undirmettur í heilsuverkinum og í undirvísingarverkinum.

Verður henda íløga raðfest høgt – koma framstigini og ábøturnar heilt av sær sjálvum.

Tíðin er komin til tess.

# Vælferðarsamfelag og ein sterkur búskapur



HELENA DAM
Á NEYSTABØ
Javnaðaflokkurin

Vælferðarsamfelagið er treytað av ábyrgdarfullum búskaparpolitikki. Málið við búskaparpolitikki Javnaðarfloksins er at tryggja búskaparvøkstur, vinnuni greiðar karmar og øllum somu møguleikar.

Hóast framgongd í samfelagnum, eru tað nøkur dimm skýggj í sjónarringinum. Tey boða frá, at álvarsamt ólag er komið á fólkasamansetingina. Tað eru í dag 2.000 færri kvinnur enn menn í aldrinum millum 24 og 39 ár. Gera vit einki, so verða tað kanska 3.000 færri ungar kvinnur um fá ár. Hetta eru tøl so stór sum ein náttúruvanlukka.

Ein stakur uppihaldari, sum vil útbúgva seg og brúka sína útbúgving og sín førleika, hevur ongan møguleika at fáa endarnar at røkka saman, tá ið húsaleiga, el, olja, stovnsplásss og skattur er goldin. Als ongan! Sjálvt hjá ungari familju er tað nærum ógjørligt. Millum annað tí velja serliga ungar kvinnur at flyta av landinum.

Gongdin kann bert broytast, um vit velja at gera Føroyar áhugaverdar at búgva í hjá okkara unga fólki, og laga okkara skipanir til broytt familjumynstur.

**Tí fari eg at virka fyri:**

- Dupultum lestrarstuðli til einsamallar uppihaldarar
- 12 mánaða barsilskipan – sum eisini pápar fáa lut í
- At bústaðarpakkin verður settur í verk beinan vegin
- At lætt verður um hjá barnafamiljum

# Ein framsókin mentunarpolitikkur



HELENA DAM
Á NEYSTABØ
Javnaðaflokkurin

Tað er bert ein grund til at:

- Føroyar eru til, og at føroyingar eru eitt fólk. Tað er mentanararvurin og føroyska málið. Skulu vit framhaldandi vera eitt land og eitt fólk, so verður tað bert eitt ríkt mentanarlív eins og ein hollur málsligur førleiki, sum kann tryggja, at so verður.

Tað verður ongantíð veruligt:

- vælferð, har sum mentanarloysi ræður.

Ongantíð áður hevur tað verið so sannheit sum nú. Kanska loysir tað seg ikki í fyrstu syftu – tað sum okkara lista- og mentafólk avrika. Men vit kunnu vera vís í, at sleppa tey einki at avrika, so er tjóðin steindeyð.

Tí fari eg at virka fyri at:

- Mentunargrunnurin verður tvífaldaður
- Tjóðpallur Føroya fæst at virka
- Skapandi listarfólk fær neyðugar fakligar, fyrisitingarligar og fíggjarligar karmar.

Við vón um at tygum í hesum valdysti hava fingið eina mynd av ætlanum mínum og Javnaðarfloksins fari eg at ynskja øllum Føroya fólki eitt gott val.